DAGSINS MEINING

Orðaskifti og kanningar

Støðan í heiminum er broytt nógv seinastu 15 árini og Kalda Kríggið millum Eystur og Vestur er av. Føroyar vóru ein finna í sálarliga stríðnum millum Sovjettsamveldið og USA. Hóast blot kom í viðurskiftini fyri fimtan árum síðani, hevur Løgtingið ikki aftur viðgjørt støðu sína við atliti til "uttanveltaðu" støðu Føroya.

Tí kann tað tykjast óheppið, at ein meiriluti í løgtingsins uttanlandsnevnd tekur undir við undanfarna og sitandi løgmanni, og gevur samgonguni NATO loyvi at gera tøkniligar forkanningar í samband við ætlanina at byggja eina nýggja samskiftisskipan á Eiði og á Sornfelli, áðrenn eitt aðalorðaskifti um trygdarpolitikk hevur verið á Føroya Løgtingi.

Løgtingið hevur gjørt fýra samtyktir, har uttanveltaða støðan verður staðfest. Løgtingið hevur sagt umheiminum, at Føroyar skulu haldast uttan fyri ósemjur landanna millum, og at hervald ikki skal verða knýtt at støðunum, NATO lat byggja ímóti Løgtingsins vilja í fimti- og sekstiárunum.

Hvørki Danmark ella NATO hava virt hesar samtyktir, og einki er gjørt fyri at fremja fráboðaninar í verki. Tað merkir, at føroyingar í stillum hava góðtikið støðuna, og tað er neyvan í andsøgn til vestansinnaðu støðu føroyinga. Men hiðani og so geva loyvi til kanningar er eitt stórt lop.

Hevði tað ikki sømt seg betur, um Løgtingið hevði viðgjørt støðu Føroya, áðrenn nakað loyvi varð givið. Somuleiðis hevði tað havt týdning, um eitt samt Løgting kundi gjørt eina nýggja samtykt, sum myndaði støðuna í heiminum í dag. Víst er bara talan um forkanningar, men spurningurin er so, um sjálvt eitt forkanningarloyvi er í samsvar við hernaðarsamtyktirnar.

Vit mugu so bara sanna, at vissuliga dráladi undanfarna landsstýrið, tí fyrispurningurin kom fyri trimum árum síðani. Men hinvegin hevði NATO arbeitt við sonevndu SSSB-Far ætlanini í eini fimtan ár, áðrenn landsstýrið fekk ein fyrispurning. Tá alt hetta er sagt, so skal leggjast afturat, at hetta er helst fyrstuferð, at danskir verjumyndugleikar, landsstýrið og Løgtingið - uttanlandsnevndin - spæla við opnum kortum. Tað er hóast alt eitt framstig, men eftir stendur, at fyri fyrstuferð fær ein verju- ella hernaðarsamgonga loyvi at at gera kanningar í Føroyum.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Javnstøðulógin 10 ár á baki

Hans Pauli Strøm
landsstýrismaður í javnstøðumálum
Á kvinnudegnum 8. mars 2004

Hitt kynið

Í føroyskum politikki eru konufólk framhaldandi hitt kynið. Fáar í tali, og fyri føroyingar, sum ganga inn fyri javnari politiskari umboðan millum kynini, vóru útlitini alt annað enn bjørt eftir løgtingsvalið í januar í ár. Seinastu 10 árini hava verið 4 ella 5 konufólk millum løgtingslimirnar, men í ár minkaðu talið so niður í 3.

Tað hægsta talið av kvinnuligum løgtingslimum nakrantíð er 5. Hetta var í 1994, tá Maria Hansen, Lisbet L. Petersen, Marita Petersen, Helena Dam á Neystabø og Ingeborg Vinther í eitt tíðarskeið høvdu sæti á tingi. Í løgtinginum vóru tá 32 limir, so í eitt tíðarskeið var kvinnuliga umboðanin í føroyska parlamentinum knappliga 16 prosent. Hetta er føroyskt met.

Hugvekjandi

Hesi tøl eru hugvekjandi. Serliga tá fjølmiðlarnir júst hava borið tey tíðindi, at fjórði hvør fólkavaldi politikari í Irak skal vera konufólk. Hetta er komið í eina fyribils grundlóg, sum Irakiska Stjórnarráðið er komið ásamt um við teirri grundgeving, at valskipanin skal tryggja eina rættvísa umboðan av øllum landsins íbúgvum.

Kvinnurnar skulu sostatt telja 25 prosent í irakiska parlamentinum, meðan tær eftir 20. januar í ár telja 9,3 prosent í føroyska løgtinginum. Tær telja helvtina av landsins íbúgvum, og tær eru ein lítil minniluti á tingi. Tær eru hitt kynið.

Í landsstýrinum er støðan einki øðrvísi. Vit hava havt kvinnuligan løgmann, Maritu Petersen, og í eitt tíðarskeið í 80'unum vóru tvey konufólk í landsstýrinum. Hesar vóru Karolina Petersen og Jóngerð Purkhús. Annars hevur ein ella eingin kona verið millum tey, ið manna landsins stýri.

Og nú nýtt landsstýrið varð skipað, var harmiligt at einki pláss var fyri nøkrum konufólki. Eitt slag av javnstøðupolitiskari nullhugsjón kundi man freistast til at hugsa. Men tað eigur so at fáa hesar somu politisku flokkar at taka sær um reiggj til frama fyri einum meira virknum javnstøðupolitikki.

Almenn ábyrgd

Fólk eru sera ójøvn á máli um, um tað er ein almenn uppgáva og ábyrgd at fáa fleiri konufólk at verða virkin í politikki. Tær hava somu møguleikar sum menninir at gera seg galdandi politiskt, verður sagt. Tað eru teirra egna val, verður sagt. Tær hava ikki hug at fara upp í politikk, tí tær raðfesta familjuna hægri, verður sagt. Og úr politisku flokkunum hoyrist, at tað als ikki er nøkur løtt uppgáva at fáa tær at stilla upp.

Sum landsstýrismaður í javnstøðumálum haldi eg, at tað almenna eigur at virka fyri, at kynsbýtið í politikki verður javnari, við at fleiri konufólk fáa sæti á tingi. Spurningurin er so, hvussu tað ber til at røkka hesum máli.

Orsøkir

Higartil er mær vitandi ikki nógv arbeiði gjørt fyri at útvega upplýsingar, sum kundu víst á møguligar orsøkir til, at so fá konufólk eru millum okkara fólkavaldu. Aloftast eru gitingar og pástandir grundarlagið undir kjakinum, tá hesin spurningur er á skránni, bæði í privatum og almennum høpi.

Javnstøðunevndin hevur tikið eitt áhugavert stig til at nærkast einum svari við at biðja um eina Gallupkanning av arbeiðsbýtinum í teimum føroysku heimunum. Ikki tí at eg haldi, at tað almenna skal leggja uppí tað, sum fer fram innanveggja í heiminum. Men eg haldi tað vera áhugavert at fáa at vita, um ein orsøk til, at vit hava so fáar kvinnuligar politikarar er, at tær eru ovbyrjaðar, tí tær umframt at arbeiða allan dagin, eisini einsamallar standa fyri húsi og heimi.

Tiltøk

Fleiri upplýsingar um livikor, um familjumynstur, um arbeiðslív og um onnur viðkomandi viðurskifti eru neyðugar, fyri at fáa greiðu á, hví tann kvinnuligan umboðanin á tingi er so avmarkað.

Eisini eiga vit at skipa fyri ítøkiligum átøkum fyri at røkka málinum: einum javnari kynsbýti á tingi. Átakið Fleiri kvinnur á ting, sum Javnstøðunevndin tók stig til fyri løgtingsvalið í 2002 er eitt gott dømi um eitt væleydnað átak: 4 konufólk vórðu valdar, og tað var samsvar millum talið á kvinnuligum valevnum og talinum á kvinnum, sum komu inn.

Ójavni í javnstøðuarbeiðinum?

Løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn kom í gildi í 1994. Hon hevur til endamáls at beina burtur allan mismun vegna kyn, og at veita kvinnum og monnum eins møguleikar til útbúgving, arbeiði umframt til yrkisliga og mentanarliga menning. Eisini ásetur hon, at Javnstøðunevnd skal veljast eftir hvørt løgtingsval.

Higartil er høvuðsdenturin í tí almenna arbeiðinum fyri javnstøðu lagdur á at betra um støðuna hjá kvinnum. Stórur tørvur hevur verið og er framhaldandi á hesum arbeiði, sum Javnstøðunevndin hevur gingið á odda fyri.

Men tíðin er eisini komin til at breiðka javnstøðuarbeiðið til at fevna um spurningar, sum beinleiðis eru tengdir at livikorunum hjá mannfólki. Eitt dømi um ein slíkan spurning, ein ójavna í javnstøðuni, er foreldramyndugleiki. Á hesum økinum eru tað menninir, páparnir, sum eru fyri vanbýti. Á heimasíðuni hjá Javnstøðunevndini, www.javnratt.fo, eru ymsar síður av spurninginum um foreldramyndugleika lýstar. Og fyri stuttum varð eitt felag stovnað, sum hevur til endamáls at arbeiða fyri rættinum hjá barninum til bæði foreldrini.

At enda

Javnstøðulógin hevur nú 10 ár á baki. Og arbeiðið fyri javnstøðu er við tíðini ment til at fevna um spurningar, sum bæði kvinnur og menn kunnu taka til sín. Soleiðis skal tað eisini vera.

Tann gongda javnstøðuleiðin er eitt samanspæl millum privat tiltøk, sprottin úr grasrótunum, og eitt miðvist arbeiði í almennu fyrisitingini. Hetta arbeiði krevur eina væl gjøgnumhugsaða langtíðarætlan, har ítøkilig mál verða sett, og har úrslit verða mátað.

Í Almanna- og heilsumálaráðnum fara vit nú í holt við hetta drúgva og neyðuga arbeiðið.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard ave@post.olivant.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásetlu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Skipaður kvinnuhandil í Føroyum

Heidi Petersen
Løgtingskvinna fyri Tjóðveldisflokkin

Umróða á løgtingi 4.mars 2004, av svari frá Jógvan við Keldu, landsstýrismanni, uppá fyrispurning frá Annitu á Fríðriksmørk og Heidi Petersen, løgtingskvinnum um skipaðan kvinnuhandil í Føroyum.

Takk fyri svarið. Tað framgongur av svarinum at landsstýrismaðurin hevur tikið málið í álvara, og er tað at fróðast um.

Landsstýrismaðurin kemur í svarið sínum inn á ST samtyktina um sáttmálan um at stríðast ímóti skipaðum kriminaliteti tvørtur um landamørk. Eisini nevnir hann, at sum ein liður í hesum arbeiðið, er eitt gerðaskjal samtykt, um at basa mannahandli við serligum denti á handli við kvinnum og børnum, har endamálið er í fyrstu atløgu at fyribyrgja, at kvinnur og børn verða seld yvirhøvur, og í aðru atløgu at hjálpa offrunum.

Upplýst verður at danir staðfestu sáttmálan og gerðaskjalið á heystið 2003. Og eg eri sera fegin um at landsstýrismaðurin nú vil taka stig til at fáa sáttmálan lagdan fyri Løgtingið, eg gangi út frá at tá landsstýrismaðurin leggur sáttmálan fyri tigið, at tað eisini umfatar gerðaskjalið.

So um úrslitið av fyrispurningi okkar, verður ein Løgtingssamtykt um at seta í gildið ST sáttmálan um at stríðast ímóti skipaðum kriminaliteti tvørtur um landamørk, við gerðaskjalinum um mannahandli við serligum denti á handli við kvinnum og børnum, so meti eg at fyrispurningur okkara hevur tænt einum góðum endamálið. Fyri framtíðina verður so ongin yvi um hvørjar reglur eru galdandi í Føroyum um slík mál.

Tó er eitt sum undrar meg stórliga í svarið landsstýrismannsins uppá fyrispurningin um lýsing í Føroyskum bløðum við útlendskum kvinnum, og tað er, at hann skítir seg undir, og sendir fyrispurningin beinleiðis til fútan. Var ætlan okkara at spyrja danskar myndulleikar eftir á hvønn hátt og hvussu vit skipa okkum í Føroyum, so høvdu vit sent spurningin beinleiðis til fútan. Tað var júst fyri at fáa landsstýrismannsins hugsan um málið, at vit settu honum fyrispurningin.

Eisini er tað undrunarvert, at tá vit spyrja um lýsing í føroyskum bløðum við útlendskum kvinnum, at landsstýrismaðurin eisini her skítir seg beinleiðis undir svar fútans um, at hetta er ein konttakt lýsing, sum hevur til endamáls at hjálpa fólki at koma í samband hvørt við annað, og at revsilógin ikki bannar lýsing av slíkum slag.

Kann landsstýrismaðurin vísa mær eina einastu lýsing í føroyskum bløðum har einligir menn ella einligar kvinnur lýsa eftir einum hópi av fremmandum kontaktum? Ella sum tað stendur í lýsingin:

Ynskja tygum samband við thailendskar, kinesiskar ella russiskar kvinnur í øllum aldri:

Tað er mær vitandi ikki komið fyri. Henda lýsing vit spyrja um er týðuliga merkt av at talan ikki er um eina vanliga kontaktlýsing, har ein maður/kvinna søkir samband við eina kvinnu/mann, men at ein millummaður bjóðar hópin av kvinnum fram, og í samrøðuni við mannin framgongur at eisini peningur er uppi í.

Málsøki viðvíkjandi revsirættinum er danskt, og tí vendir landsstýrismaðurin sær beinæiðis til fútan og biður hann um viðmerkingar viðvíkjandi lýsingini, og svarar hann at lýsingin ikki er haldgott prógv fyri at skipaður kvinnuhandil fer fram í Føroyum.

Men hetta svarið førir meg til spurningin um alt skal meldast til fútan, um nakað skal verða kanna nærri í hesum samfelagi. Er eingin eftirlitsmyndlleiki til í Føroyum? Ella hvussu?

Men álvara tos landsstýrismaðurin, er hetta ikki eitt greitt tekin um at ongin í Føroyum varar av einum so tíðandi øki sum revsirættinum, skulu vit ikki taka okkum saman og yvirtaka málsøki sum skjótast, tað er í hvussu so er mín niðurstøða eftir hesa viðgerðina av málinum.

At búgva í Runavík anno 2004

Tóta Árnadóttir

Fyri skjótt 10 árum síðani flutti undirritaða til Runavíkar. Tað var meðan kreppan enn lá yvir landið og stemningurin av at alt var meira ella minni í bíðistøðu var nakað tann sami allastaðni. Eg hugsaði tí ikki stórvegis um, at tað var so alstórur munur á lívinum í Havn og so her inni á tí vakra Skálafjørðinum. Men hesi seinastu tíggju árini er mangt broytt, samfelagshjólini fóru at mala aftur uppá gott og ilt, og nógva staðni hava vit sæð menningina á fleiri økjum, bæði búskaparliga og mentanarliga. Eisini inni á Skálafjørðinum hevur menning verið, og í kommununi, sum í sínum búmerki hevur sloganið "Ein kommuna í menning", kanska eina mest. Men hvat er hetta fyri menning? Vinnulívið er ment, og nýggj hús vera bygd. Ein nýggjur barnagarður er komin. So far so good.

Men hvat er hent á mentanarøkinum? Jú, her eru vit enn í somu bíðistøðu sum fyru 10 árum síðani. Sunnudag seinnapartur tykist verða idealstøðan hjá teimum sum ráða fyri borgum. Møtir, ein biltúr um veðrið er gott, kanska eina hendinga klassiska konsert í býráðshøllini. Av og á ein "rimmar dansur" til frama fyri okkurt ítróttarfelag. Ein nevnd er sett at tosa um mentanarhús, tað er í roynd og veru tað, ið er hent uppá 10 ár. Seinast eg frætti, var ætlanin at sláa eitt tílikt hús saman við onkrum slagi av ítróttarhúsi, ja, tí er fótbóltur kanska ikki eisini mentan? (Jú tað er tað, líkasum hondbóltur, bindiklubbar, skerpikjøt, missiónsmøtir, føroyskur dansur og postalínsmáling..... men tað er kortini munur á, og alt kann ikki bara koyrast í sama pott).

Meðan børnini eru smá krevst kanska ikki so nógv av tilboðum annað enn ansingarmøguleikar fyri tey, ið hava tørv á hesum og so tað vanliga; fimleikur, sunnudagsskúli fyri tey, ið tíma tað, onkur hendinga tiltøk av øðrum slagi. Og tá ið tey koma í skúlaaldur, koma so kvøldskúlatilboðini og aðrar ítróttargreinar afturat. Tað er sum so OK, ein kann ikki fáa alt, ið ein kundi hugsað sær á einum kortini ikki so stórum plássi. Fyri tey gomlu í býnum eru eisini skipaði tiltøk mest sum hvønn dag í vikuni, við dugnaligum starvfólki og til stóra gleði fyri henda bólk av íbúgvum. Tað er alt samalt sára gott.

Men millum tey 12-13 ára gomlu og tey yvir 67 er eitt veldugt glopp. Tey ungu hava tveir møguleikar: ítrótt ella møtir. Tey tilkomnu tykjast vera nøgd við parabolirnar og ein Havnatúr í bilinum við hvørt. Tað er eyðsæð at meirilutin helst er vælnøgdur, tey hava jú valt núverandi býráð og munnu tí ikki halda orsøk vera til broytingar. "Gongur tað kanska ikki óluksáliga væl við vinnulívinum?" Hetta tykist vera niðurlagið. Men tað finst kortini ein stórur minniluti her á staðnum, sum kennir seg fullkomuliga knúskaðan av líkasæla meirilutanum. Trupulleikin er bert, at so skjótt tú hevur hug at seta onnur krøv fram, er tað sum um svarið er so einfalt "dámar tær ikki hetta, so kanst tú bara fara onkra aðra staðni". Lætt sloppið og neyvan haldgott í longdini, málið kann væl ikki verða, at vit øll skulu vera eins og dáma øll tey somu tingini. Ella at Runavík bert skal vera fyri eitt slag av fólki, sum fær tað tey vilja hava, meðan hini so dánt verða told, so leingi tey tega.

Eitt er at kommunan als ikki tykist vilja standa við sína ábyrgd yvirfyri ungdóminum - t.d. við at útvega líkinda ungdómshús, har ymisk og fjøltáttað tilboð áttu at verið fyri henda bólkin av borgarum.

Annað er at hon beinleiðis leggur seg út í og uppá ein fullkomuliga avoldaðan máta ger seg til klóku mostir hjá okkum øllum, sigur okkum hvat okkara ungu skulu gera og ikki gera og leggur fót fyri at ein sum Kenneth Rasmussen sleppur so mikið sum at royna at fáa eitthvørt á fatur fyri henda bólkin. Tað er forkastiligt og ber boð um ræðandi snævurskygni. Tí hvør orkar at blíva við at royna og royna at gera nakað nýtt í einari kommunu, sum sær tað sum sína fremstu uppgávu at vera dadda hjá sínum borgarum og sum drívir missiónsvirksemi av býráðskrivstovuni? Gamaní, tað skal vera pláss fyri tí virkseminum eisini og tað er óivað fyri at føra tílíkan politikk, at tey sum settu seg tvørt fyri í hesum førinum eru vald. Men eitt er at geva pláss fyri tí andaliga og skikkiliga, annað er at køva alt sum fer út um teirra persónliga mark, bara tí at tey ikki kundu hugsað sær at luttikið í tílíkum "ólevnaði". Hvussu høvdu tey hugsað, um tey "verðsligu" á sama hátt fóru inn og saboteraðu sunnudagsskúlavirksemið á staðnum, tí at tað ikki samsvaraði við teirra uppfatan av sunnum ítrivi fyri smábørn?

Eg eri farin at stúra fyri hvussu ungdómurin hjá mínum børnum fer at laga seg, um tey framhaldandi fara at búgva her. Misskil meg ikki, eg havi ikki nakað ynski um at mínar døtur partout skulu drekka seg frá sans og samling hvørt vikuskifti, tá tær koma í tann aldurin. Men eg vil 1000 ferðir heldur at tær sleppa at traðka síni fyrstu fet út í eitt livandi ungdómslív á staðnum, har tær búgva, enn at tær skulu verða noyddar at leita sær uttanbýggja fyri at sleppa í býin. Fyri meg er tað hugstoytt at hugsa sær, at valið hjá teimum kemur at vera avmarkað til ungdómsmøti á Glyvrum ella í Berøa ella rukkukoyring til Havnar í vikuskiftinum. Okkurt tilboð átti at verið, sum lá onkustaðni harímillum. Sum nú eitt dansistað her á staðnum. Eg havi fult álit á, at tey ungu í dag sum heild duga at handfara tað at tað verður skonkt eitt stað, og tey sum ikki duga sær hógv skulu nokk koma sær í óføri, sama um dansi- og skeinkiloyvi verður afturhildið í Runavík. Tey hava brúk fyri øðrum og meira enn forboðum, um tey skulu rokkast og hjálpast. Tað einasta tú fært burturúr at nokta at hava slík tilboð her á staðnum er, sum onnur hava gjørt vart við, at sannlíkindini fyri fleiri syndarligum ferðsluvanlukkum standa við og økjast.

Tey sum hava tikið avgerðina um at nokta Kenneth Rasmussen loyvi at skipa fyri dansi við skeinkiloyvi, hava fylgt ov illa við í hvat ið fer fram í Runavík anno 2004. Ella eisini velja tey at lata eyguni aftur fyri tí og vaska sínar hendur. Mær er sagt, at tey 15-16 ára gomlu gjalda tilvildarligum bilførarum fleiri hundraðtals krónur fyri at sleppa til Havnar. Ynskja foreldrini veruliga at hetta skal halda fram? Fara tit at velja hasi fólkini enn einaferð?

Vónandi ber tað til at broyta hasa púra høpisleysu avgerðina; tó vita vit at mál hava mangan verið súltað og tað kunnu helst ganga fleiri ár áðrenn ein møguleiki sum hesin aftur kemur á býráðsborðið. Um tit ongum øðrum vilja lova framat at gera nakað fyri ungdómin, gerið so um ikki annað okkurt sjálvi! Útvegið eitt nútímans ungdómshús at byrja við.

Ella skal tað í alla framtíð bara eita: Runavíkar kommuna - ein kaikantur í menning?